Undirskrift formansins:_____

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 18.11.2021 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Herfrí J. Sørensen møtti fyri Jóhannu Christiansen, og Andreas Josephsen møtti fyri Óla M. Lassen
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
170/21	21/01858-4	Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi 18. nov. 2021 - Jóhanna C. Christiansen og Óli M. Lassen
171/21	21/01807-1	Val av limi/tiltakslimi í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya
172/21	21/01268-3	Byggisamtyktarbroyting á Fossum
173/21	21/01312-1	Íbindingargjald fyri íbúðir
174/21	21/01310-1	Handils- og íbúðabygging á Kirkjubrekku 3, kloakkviðurskiftir
175/21	21/01806-1	"Sproyta" til tilbúgvingina – *flyt. ml. høvuðskontur, fyrra viðgerð*
176/21	21/01278-1	Kloakk-/spillivatnsætlan - íløga 2021 (Heygavegur v.m.) – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
177/21	21/01281-3	Lastbilur við krana til kloakktoymið, fígging í 2021 – *flyt. ml. høvuðskontur, fyrra viðgerð*
178/21	21/01383-1	Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021 - *seinna viðgerð*
179/21	21/01563-1	Rakstrartørvur á Skúlatrøð, tørvur á eykajáttan 2021- *seinna viðgerð*
180/21	21/01555-1	Skoytubreytin 2021/2022 - *eykajáttan seinna viðgerð*
181/21	21/01564-1	Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy - *eykajáttan, seinna viðgerð*
182/21	21/01280-1	Moldvegur og felagsorkuloysn á Fossum
183/21	21/01266-23	Fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu 2022
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
184/21	21/01598-1	Umsókn um keyp av lendi

Til viðgerðar

170/21
21/01858-4 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi 18. nov. 2021 - Jóhanna C. Christiansen og Óli M. Lassen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	170/21

21/01858-4 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi 18. nov. 2021 - Jóhanna C. Christiansen og Óli M. Lassen

Frágreiðing um málið:
Jóhanna C. Christiansen, býráðslimur vald fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at hon hevur forfall til býráðsfundin 18. nov. 2021. Næstvaldi á listanum hevur eisini forfall, og tí er heitt á Herfrí J. Sørensen, ið er triðivaldi tiltakslimur á listanum, um at møta til fundin.

Óli M. Lassen, býráðslimur valdur fyri Sjálvstýri, hevur eisini boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 18. nov. 2021. Heitt er tí á næstvalda á listanum, Andreas Josephsen, um at møta til fundin.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1 og stk. 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimirnar, um býráðið avger at lata teir taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til áheitanina um at innkalla tiltakslimir fyri Jóhonnu C. Christiansen og Óla M. Lassen.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Einmælt samtykt at lata Herfrí J. Sørensen og Andreas Josephsen taka sæti í býráðnum til fundin.

171/21
21/01807-1 Val av limi/tiltakslimi í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	171/21

21/01807-1 Val av limi/tiltakslimi í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 28. jan. 2021 valdi býráðið tveir limir og tveir tiltakslimir í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya; valdar vórðu Elsa Maria Lorenzen (tiltakslimur Berit Norðoy) og Hanna Jacobsen (tiltakslimur Anja Eliassen).

Nú hevur Hanna Jacobsen boðað frá, at hon tekur seg úr nevndini. Í viðtøkunum fyri Húsarhaldsskúlan er ásett, at tiltakslimur tekur fast sæti í nevndini, um nevndarlimur fer frá í úrtíð. Hetta viðførir sostatt, at Anja Eliassen stendur fyri at skula taka sæti í nevndini, og býráðið harvið skal velja nýggjan tiltakslim fyri hana.

Lógargrundarlag:
§ 5 í viðtøkum fyri Húsarhaldsskúla Føroya:
Skúlin verður stjórnaður av eini 5 manna nevnd, ið verður vald soleiðis:
* Klaksvíkar Húsmøðrafelag velur 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir,
* *Klaksvíkar Býráð velur 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir*,
* Kvinnufelagssamskipan Føroya velur 1 nevndarlim og 1 tiltakslim.
2. stk. Berst nevndarlimi frá at møta á nevndarfundi, møtir tiltakslimurin í hansara stað. Nevndarlimurin skal sjálvur boða tiltaksliminum frá. *Tiltakslimurin tekur fast sæti í nevndini, um nevndarlimur fer frá í úrtíð.*

§ 35 í kommunustýrislógini:
... . Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir *lutfalsvalháttinum* sambært § 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at býráðið velur nýggjan tiltakslim í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya fyri tað, ið eftir er av býráðssetuni.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Einmælt samtykt at velja Gunnvá Tróndardóttir Joensen til tiltakslim í nevndina fyri Húsarhaldsskúla Føroya.

172/21
21/01268-3 Byggisamtyktarbroyting á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	153/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	83/21
3 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	172/21

21/01268-3 Byggisamtyktarbroyting á Fossum

Frágreiðing um málið:
Í samband við at broytingar eru gjørdar fyri bústaðaverkætlanina á Fossum, er neyðugt við broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið á Fossum.
Broytingar hava verið í projekteringini av vegunum, sum síðan hava ført við sær, at neyðugt hevur verið við smærri broytingum innan staðseting av nøkrum av grundstykkjunum.
Broytingin fevnir um broytingar í ásetingunum fyri A2 og broytingar í økismørkunum fyri A4 og D39, sum liggja uppat A2.

Í A2 verður grundøkjavídd fyri samanbygd sethús lækkað úr 200 m^2 til 150 m^2.

Orðingin fyri mest loyvdu bygningshædd verður broytt frá at taka støði í miðaljørðildi til at taka støði í grovplanering. Nevnast skal, at endalig støða ikki er tikin, um mest loyvd hædd skal vera 6 m ella 7 m til yvirgrind fyri sethús við vanligari møn, og um hæddin fyri sethús við einsíðugum takhalli skal vera 7,5 m ella 8 m. Fyrisitingin arbeiðir saman við ráðgevanum um at staðfesta endaliga bygningshædd, so skjótt sum tað ber til.
Viðvíkjandi fríøkjum verður víst til útstykkingarætlanina á Fossum, ið leggur upp til, at nógv almenn fríøkir við ymiskum hentleikum eru staðsett í býlinginum. Áður lýst krøv til parkering verða strikað, og í staðin verður víst til bygningskunngerðina, ið vísir til eitt breitt úrval av loysnum.

Avleiðingin av hesi broyting er, at minkað verður um A4 fyri at økja um A2, tí nøkur grundstykkir komu at liggja helvt um helvt í A4 og A2. Annars verða smærri broytingar gjørdar í mun til markið millum útstykkingina á Fossum og økið uttanfyri byggisamtyktina (landbúnað).
Somuleiðis verður økt munandi um D39 fyri at fáa betri samanhang í D-økið og økið Niðan Horn.
Harnæst verður lagt upp til, at nýggj økir til almenn endamál og ídnað verða sett á stovn. Eitt til framtíðar ansingarstovn í nýggja býlinginum, kallað C19, og nýtt ídnaðarøki ætlað til vatnbrunnarnar, kallað B27.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir nevnd og býráði til at loyva fyrisitingini at fremja byggisamtyktarbroytingina, sjálvt um endalig støða ikki er tikin um endaliga bygningshædd.
Fyrisitingin byrjar tilgongdina við almennari hoyring, so skjótt sum støða er tikin til mest loyvdu bygningshædd, sum lýst í frágreiðing.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-11-2021.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá TN 10-11-2021 einmælt samtykt.

173/21
21/01312-1 Íbindingargjald fyri íbúðir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	159/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	78/21
3 Fíggjarnevndin	16.11.2021	138/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	173/21

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

21/01312-1 Íbindingargjald fyri íbúðir

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar kommuna hevur ásett eitt íbindingargjald, tá bygt verður á privat grundøkir í kommununi, og hevur gjaldið síðani tann 1. januar 2012 verið 100 kr./m^2 grundøki, tó í mesta lagi 50 tkr.

Nú áhugin fyri íbúðabygging er vaksandi, er tørvur á at áseta reglur fyri íbúðabygging á privatum grundøkjum.

Dømi um gjald fyri íbúðabygging:
Um bygdar verða 4 íbúðir á eitt stykki, sum er 800 fermetrar, verður gjaldið pr. íbúð 20 tkr. (800/4x100).
Um bygdar verða 4 íbúðir á eitt stykki, sum er 600 fermetrar, verður gjaldið pr. íbúð 15 tkr. (600/4x100).

Omanfyri standandi dømi er galdandi fyri Borðoynna. Fyri aðrar oyggjar í kommununi er gjaldið 50 kr./m^2 grundøki, og verður kostnaðurin fyri íbindingargjald tilsvarandi lægri.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Tryggjað verður við hesum, at kommunan ikki missir inntøkur av íbindingargjaldi *(veg- og kloakkgjaldi),* tá bygt verður á privat grundstykkir.

Tilmæli:
Mælt verður til at nýta sama prinsipp sum galdandi fyri einstøku grundstykkini, tó soleiðis, at gjaldið verður sett til 100 kr./m^2 grundøki pr. íbúð á Borðoynni, og 50 kr./m^2 grundøki pr. íbúð í bygdunum á oyggjunum, sum lýst í døminum omanfyri.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-11-2021.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við TN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

174/21
21/01310-1 Handils- og íbúðabygging á Kirkjubrekku 3, kloakkviðurskiftir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	158/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	79/21
3 Fíggjarnevndin	16.11.2021	139/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	174/21

21/01310-1 Handils- og íbúðabygging á Kirkjubrekku 3, kloakkviðurskiftir

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 2. nov. 2021, verður greitt eitt sindur nærri frá málinum.

Tekniska umsiting hevur staðfest, at hetta er mál, sum krevur breiðari viðgerð, har m.a. niðanfyri standandi viðurskifti verða at greiða:

1. teknisk viðurskiftir
2. ferðsluviðurskifti í mun til Kirkjubrekkuna og gonguleið til økið á Fossum
3. onnur viðurskiftir

Í hesum málinum er tað bert punkt 1 - teknisk viðurskiftir - sum er til viðgerðar, tí málið hevur serligan skund, vegna byggingina á matr.nr. 607.

Tekniska umsiting hevur áður staðfest, at verandi betongá, sum er stoypt á staðnum, heldur ikki til almenna ferðslu. Støðan hesum viðvíkjandi er óbroytt. Áin má leggjast í betong- ella plastrør, um geilin skal brúkast sum koyrivegur.

Ein leys meting av kostnaðinum av einari dagføring av Vágsánni frá Kirkjubrekku til Vágsheygagøtu er gjørd, 1,5 mió.kr.
Tekniskt hevði tað komið sera væl við, um hetta kloakkarbeiðið kundi verið framt í nærmastu framtíð, tí avbjóðingar eru við verandi á. Annað sum eisini hevur stóran týdning fyri málið er, at kostnaðurin av einari dagføring av ánni fer at kosta munandi meira enn 1,5 mió. kr., tá bygging er framd á matr.nr. 607.

Byggiharrin hevur munnliga upplýst, at teir kunnu bíða eitt sindur eftir kommununi, men ikki ov leingi.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Óvist er, hvørjar avleiðingar málið kann fáa fyri fíggjarætlanina fyri 2021. Rørtilfar skal bíleggjast, og helst verður komið inn í 2022, áðrenn arbeiðið kann setast í gongd. Tí verður mett, at gjaldið – 1,5 mió. kr. - fyri dagføringina av Vágsánni fellur til gjaldingar tíðliga í 2022.

Tilmæli:
Við hesum verður heitt á viðkomandi nevndir og býráð um at taka støðu til spurningin um møguliga raðfesting ella játtan av peningi til omanfyri nevndu dagføring av Vágsánni.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin tekur undir við málinum, og fíggingin verður tikin upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2022.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við TN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

175/21
21/01806-1 "Sproyta" til tilbúgvingina – *flyt. ml. høvuðskontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	16.11.2021	144/21
2 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	175/21
3 Klaksvíkar Býráð	16.12.2021	

21/01806-1 "Sproyta" til tilbúgvingina

Frágreiðing um málið:
Sambært kommunustýrisskipanini fyri Klaksvíkar kommunu skulu mál leggjast fyri Teknisku Nevnd, sum hava við fyrisiting av Tilbúgvingini at gera. Fundurin hjá Teknisku Nevnd í november er hildin, og tí verður eitt mál um ein sløkkiliðsbil sent beinleiðis til FíN og Býráðið.

Umsitingin hevur samskift við borgarstjóran og formannin í Teknisku Nevnd um hetta málið, sum ikki tolir at bíða.
Talan er um sløkkiliðsbilin ella "sproytuna" hjá Tilbúgvingini, sum varð keyptur til økið norðan fyri tunlarnar fyri 12 árum síðani. Bilurin er frá 1995, og varð keyptur frá sløkkiliðnum í Odense, sum er vinarbýur kommununnar. Kostnaðurin var góðar 200 tkr.

Staðfest er, at bilurin er so illa farin, at tað fer at kosta hópin av peningi, at hava bilin koyrandi, og Akstovan góðkennir ikki bilin. Tí er ein stór kostnaðarmikil umvæling neyðug, og hesum verður mælt frá.

Tilbúgvingarnevndin hevur samtykt, at tilbúgvingarleiðarin kannar møguleikan fyri keypi av øðrum sløkkiliðsbili fyri einar 500 tkr., sum kann koma ístaðin fyri verandi bil.

Tilbúgvingarleiðarin og leiðarin fyri kommunalu smiðjuna hava síðani funnið ein sløkkiliðsbil frá 2001, sum er í sera góðum standi. Bilurin hevur nógva henta útgerð, s.s. klippiamboð, og kostnaðurin er uml. 490 tkr. Bilurin hevur fingið eina høvuðsumvæling í 2017, og er av sama slagi, sum ein annar bilur hjá Tilbúgningini frá 2002. Tí verður ikki neyðugt við stórvegis upplæring í brúkinum av bilinum.

Gjaldið hjá Klaksvíkar kommunu verður kr. 416.500,-, sum er 85% av keypinum, og skulu hinar kommunurnar í samstarvinum gjalda restina. Upplýst verður í hesum sambandi, at hinar kommunurnar hava peningin tøkan. Íroknað gjaldið er frakt og kommunalt meirvirðisgjald.

Staðfest er, at Tilbúgvingin hevur ikki nóg nógvan pening til keypið, og tí er neyðugt við meira peningi. Umsitingin hevur tí saman við avvarðandi leiðarum gjørt eitt uppskot til fígging, har peningur verður fluttur millum kontur. Víst verður til talvu 1.

Talva 1:

Navn	Budget 2021-2	Saldo 30-09-2021	Budget 2021-2	Flutt til sløkkiliðsbil	Budget
Vatnveitingar	3.460.000	2.488.731	3.460.000	-60.000	3.400.000
Smiðjan	514.000	199.005	514.000	-200.000	314.000
Sløkkiliðið	1.952.000	1.107.875	1.952.000	-160.000	1.792.000
	5.926.000	3.795.611	5.926.000	-420.000	5.506.000
Sløkkiliðið (Íløgur)	1.410.000	0	1.410.000	420.000	1.830.000
	7.336.000	**3.795.611**	**7.336.000**	**0**	**7.336.000**

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.
Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

Fíggjarligar avleiðingar:
Um tikið verður undir við málinum, verður fíggjarliga avleiðingin tann, at rakstrarsíðan á fíggjarætlanini fyri 2021 minkar við kr. 420.000,-, og íløgusíðan veksur við somu upphædd. Hetta merkir, at 420 tkr. gerast tøkar á kontuni "Sløkkiliðið Íløgur" til keyp av nýggjum sløkkiliðsbili ella "sproytu".

Málið krevur tvær býráðsviðgerðir, og tí verður málið beint til fíggjarnevndina og býráðið nú, og síðani aftur í býráðið í desember 2021.

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við keypinum og við broytingini av fíggjarætlanini fyri 2021 sambært talvu 1.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

176/21
21/01278-1 Kloakk-/spillivatnsætlan, íløga 2021 (Heygavegur v.m.) – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	160/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	80/21
3 Fíggjarnevndin	16.11.2021	141/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	176/21
5 Klaksvíkar Býráð	16.12.2021	

21/01278-1 Kloakk-/spillivatnsætlan - íløga 2021 (Heygavegur v.m.)
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini 12. nov. 2021.

Málið varð ætlað viðgjørt í oktober nevndarumfarinum, men nevndirnar beindu málið aftur í umsitingina at útgreina nærri til november nevndarumfarið.

Í stuttum snýr málið seg um, at tørvur er á eini eykajáttan til spillvatnsarbeiðið á Heygavegnum (*kloakkir íløga*).

Lógargrundarlag:
Sambært spillivatnsætlan kommununnar.

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til, at játtaðar verða 2 mió.kr. til *kloakkir íløga*, tað sum eftir er av 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin tekur undir við, at 1 mió.kr. verða játtaðar til *kloakkir íløga* av *tøkum peningi*. Nevndin ynskir at síggja eitt yvirlit yvir, hvørji arbeiðir eru avgreidd, og hvørji eru eftir (ísv. Heygaveg) sum kunning komandi nevndarumfar.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við TN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

177/21
21/01281-3 Lastbilur við krana til kloakktoymið, fígging í 2021 – *flyt. ml. høvuðskontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	16.11.2021	140/21
2 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	177/21
3 Klaksvíkar Býráð	16.12.2021	

21/01281-3 Lastbilur við krana til kloakktoymið - fígging í 2021

Frágreiðing um málið:
Tekniska Nevnd viðgjørdi 10. november 2021 eitt mál um ein nýggjan lastbil við krana til kloakktoymið á Vegadeildini, og verður í hesum sambandi víst til viðfest skriv frá kloakktoyminum.

Tekniska Nevnd samtykti pkt. 1 í tilmæli frá teknisku umsiting, har biðið var um heimild til at finna neyðuga peningin innan konturnar á tekniska økinum, sí viðfesta tilmæli og samtykt.

Umsitingin hevur síðani gjørt eitt uppskot um flytan millum konti, soleiðis at 450 tkr. verða tøkar til keypið í 2021, sí talvu 1.
Upplýst verður í hesum sambandi, at viðkomandi starvsfólk, sum varða av nevndu kontum, hava viðmælt hesum uppskoti um broyting av fíggjarætlanini fyri 2021.

Talva 1:

Navn	Budget 2021-2	Saldo 30-09-2021	Budget 2021-2	Flutt til lastbil v/krana	Budget
Vatnveitingar	3.460.000	2.488.731	3.460.000	-50.000	3.410.000
Kloakkir	1.219.000	914.218	1.219.000	-50.000	1.169.000
Ferðsluregulering	480.000	303.773	480.000	-50.000	430.000
Vegir	4.002.000	2.962.141	4.002.000	-100.000	3.902.000
Vegir (Asfalteringsviðlíkahald)	3.809.000	850.471	3.809.000	-100.000	3.709.000
Maskinur	97.000	-66.712	97.000	-100.000	-3.000
	13.067.000	7.452.622	13.067.000	-450.000	12.617.000
Masknur (íløgur	**0**	**0**	**0**	**450.000**	**450.000**
	13.067.000	**7.452.622**	**13.067.000**	**0**	**13.067.000**

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Um tikið verður undir við málinum, verður fíggjarliga avleiðingin tann, at rakstrarsíðan á fíggjarætlanini fyri 2021 minkar við kr. 450.000,-, og íløgusíðan veksur við somu upphædd. Hetta merkir, at 450 tkr. gerast tøkar á *Maskinkontoini* til keyp av nýggjum lastbili.

Tilmæli:

Tekniska umsiting mælir fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við keypinum og við broytingini av fíggjarætlanini fyri 2021 sambært talvu 1.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

178/21
21/01383-1 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	178/21

21/01383-1 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2021 - seinna viðgerð

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. oktober 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 24-09-2021. Eykajáttanin skal fíggjast av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá B&U 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

179/21
21/01563-1 Rakstrartørvur á Skúlatrød, tørvur á eykajáttan 2021 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	179/21

21/01563-1 Rakstrartørvur á Skúlatrød – tørvur á eykajáttan 2021, seinna viðgerð

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. oktober 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 5. oktober 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 24-09-2021. Eykajáttanin skal fíggjast av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá B&U 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

180/21
21/01555-1 Skoytubreytin 2021/2022 - *eykajáttan seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	180/21

21/01555-1 Skoytubreytin 2021/2022, eykajáttan seinna viðgerð

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. oktober 2021.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið, dagf. 21-10-2021, einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

181/21
21/01564-1 Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	181/21

21/01564-1 Hækkan og leingjan av kaiini á Eiðinum í Svínoy - eykajáttan, seinna viðgerð

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. oktober 2021.

Havna- og Vinnunevndin 5. oktober 2021:
Nevndin mælir til, at kommunali parturin av verkætlanini verður fíggjaður við eykajáttan og innanfyri karmin av seinastu lántøku.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2021:
Tilmælið frá HaVN 05-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021:
Tilmælið frá FíN 26-10-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 28. oktober 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

182/21
21/01280-1 Moldvegur og felagsorkuloysn á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	08.11.2021	154/21
2 Tekniska Nevnd	10.11.2021	84/21
3 Fíggjarnevndin	16.11.2021	142/21
4 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	182/21

21/01280-1 Moldvegur og felagsorkuloysn á Fossum

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 2. nov. 2021, verður greitt nærri frá málinum.

Málið snýr seg í stuttum um tvey viðurskifti, at raðfesta og finna fígging til framt arbeiðið við moldvegi í 2021 og víðari arbeiði í 2022, og støðutakan til, hvør orkuloysn skal veljast til útstykkingina á Fossum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Moldvegur 3 mió.kr. í ár og uml. 4,5 mió.kr. í 2022.

Tilmæli:
Moldvegur: Mælt verður til at raðfesta og finna fígging á 3 mió.kr. til arbeiðið í 2021 og raðfesta 4,5 mió.kr. til 2022 fyri vantandi arbeiðið.
Sjóhiti og jarðhiti: Málið verður latið nevnd og býráði til støðutakan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 8. november 2021:
Nevndin mælir til at raðfesta 3 mió.kr. innan verandi karm, og at restin verður tikin upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2022.
Nevndin tekur undir við at velja eina grøna orkuloysn.

Tekniska Nevnd 10. november 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 08-11-2021.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Nevndin tekur undir við TN 10-11-2021.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Tilmælið frá FíN 16-11-2021 einmælt samtykt.

183/21
21/01266-23 Fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu 2022

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	16.11.2021	145/21
2 Klaksvíkar Býráð	18.11.2021	183/21

21/01266-23 Fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu 2022

Frágreiðing um málið:
Karmurin fyri fíggjarætlan 2022 hjá Klaksvíkar kommunu varð lagdur fyri Býráðið 23. september, og seinni hava tveir temafundir verið, har rakstur og íløgur hava verið viðgjørd.

Raksturin hevur støði í framrokning av nýtsluni í ár, sum sigur, at rakstarútreiðslurar verða 233 mió. kr. Lønarvøksturin er mettur til 1,8%, sum gevur 3,7 mió. kr., og saman við øðrum reguleringum og uppraðfestingum fyri 5,7 mió. kr. verða rakstrarútreiðslurnar komandi ár mettar til 242,4 mió. kr. Postarnir rentustuðul og rentur eru settir til 8 mió. kr., og við hesum verður samlaði raksturin 250,4 mió.kr.

Skattainntøkurnar eru 310 mió. kr., sum er 20 mió. kr. meira enn væntast at koma inn í ár. Við hesum verður rakstrarúrslitið 59,5 mió.kr.

Íløgurnar eru netto 78,4 mió.kr. Hetta merkir, at RLÚ-úrslitið verður eitt hall upp á 18,8 mió.kr., sum verður figgjað við lántøku.

Á niðanfyri standandi talvu er uppsetur tann samlaði fíggjarkarmurin fyri 2022 hjá Klaksvíkar kommunu.

Klaksvíkar kommuna				Fíggjarætlan 2022			
Rakstrarstøð	Roknsk. 2020	Dagførd ætlan 2021	Meting R2021	Lønar-vøkstur	Aðrar reguleringar/upp praðfestingar	F.ætlan 2022	Munur R2021/Æ2022
1.000 kr.				1,80%			
Kommunal fyrisiting	25.949	23.273	27.001	348	-2.150	25.200	-1.801
Almanna- og heilsumál	81.929	86.765	87.465	1.836	1.244	90.544	3.079
Børn og ung	47.893	46.399	48.232	855	1.963	51.050	2.818
		0	0				
Útbúgving og gransking	11.801	11.445	12.781	30	378	13.189	408
Mentan og frítíð	19.460	14.896	15.325	182	893	16.400	1.075
Teknisk mál	23.447	24.155	25.000	356	1.344	26.700	1.700
		0	0				
Kommunalt virki	16.186	16.890	17.252	111	2.029	19.393	2.140
Rakstrarútreiðslur	226.666	223.823	233.057	3.719	5.700	242.476	9.419
Fíggjarútreiðslur	6.819	7.000	7.368	0	632	8.000	632
Rakstrarútreiðslur tilsamar	233.485	230.823	240.425	3.719	6.332	250.476	10.051
Inntøkur tilsamans	-295.445	-305.000	-289.862	0	-20.138	-310.000	-20.138
Rakstrarúrslit	-61.960	-74.177	-49.437	3.719	-13.805	-59.524	-10.087
Íløgur	118.929	164.908	160.000			78.400	-81.600
RLÚ	56.969	90.731	110.563	3.719	-13.805	18.876	-91.687

Íløgurnar eru 111,5 mió. kr., og við ætlaðari sølu av fastogn og grundstykkjum 33,1 mió. kr. verða íløgurnar netto 78,4 mió. kr. Íløgustuðulin til Mentanarhúsið (12 mió.kr.) er við undir íløgunum, men upphæddin verður flutt til rakstur, tá peningurin verður útgoldin.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Íløgur:		
Skúlatannlæknin	400	
NBH, Bøgøta	2.000	
NBH, Tænastudepil á Viðareiði	3.000	
§ 2: Almanna- og heilsumál	5.400	
Barnagarðar - ábøtur	500	
Barnagarðar - ljóðdoyving	200	
§ 3: Børn og ung	700	
Skúlagarður	3.000	
Nýggjur skúli	1.000	
§ 4: Undirvísing	4.000	
Mentanarhús (íløgustuðul)	12.000	
Svimjihylur Svínoy	100	
Stadionøkið - skýlið	3.500	
Róðrarneyst	7.500	
Bókasavn - Isenkram	700	
Havsvimjarar	400	
§ 5: Mentan og frítíð	24.200	
Sparkivallir	1.200	
Sparkivallir, liðugtgerð	300	
Fastognir	2.000	
Søla fastognir	-5.500	
Byggibúning	32.400	
Byggibúning - søla lendi á Fossum	-12.400	
Byggibúning vegir eldri hús	2.500	
Byggibúning - søla lendi aðrastaðnis	-3.000	
Kloakkir	3.000	
Byggibúning ídnaðarøki	4.300	
Byggibúning ídnaðarøki - søla lendi	-12.200	
Byggibúning miðbýur	2.000	
Vegir	7.000	
Vegir niðanfyri raðhúsini við Stangaveg	3.000	
Maskinur	2.000	
§ 6: Teknisk mál	26.600	
Sløkkiliðið	3.100	
Bátahylur Árnafirði	8.000	
Víðkan Norðhavnin	3.000	
Havnagerð Pomek	1.400	
Dýping á vágni	1.000	
Sølutorg	1.000	
§ 7: Kommunal virki	17.500	
Íløgur netto		78.400

Lántøka og myndugleikagóðkenning
Uppskotið vísir 18,8 mió. kr. í halli, og tá kommunan ikki hevur tøkan pening til endamálið, er neyðugt við lántøku. Av tí at nettoskuldin er omanfyri álíkningina, er neyðugt at fáa góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum.
Tá ið kommunan í august í ár søkti um loyvi at taka lán, boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at umsóknin var gingin á møti við teirri treyt, at skuldin hjá kommuni í seinasta lagi í fíggjarárinum 2024 kemur niður undir skuldarmarkið aftur. Klaksvíkar kommuna fer, eftir umbøn frá Fíggjarmálaráðmum, at senda Fíggjarmálaráðnum, saman við fíggjarætlanini, eina frágreiðing, sum vísir, hvussu komið verður undir álíkningina.

Umframt frammanfyri standandi rakstrar- og íløgukarm skal eisini støða takast til ásetan av skattaprosenti og barnafrádrátti, ið eru 20,75% og 5.500 kr.

Lógargrundarlag:
Kommunulógin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin og býráðið samtykkja hetta uppskot til fíggjarætlan 2022 hjá Klaksvíkar kommunu. Skattaprosentið og barnafrádráttur skal eisini ásetast.

Fíggjarnevndin 16. november 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-11-2021; tó við teirri broyting, at 1 mió.kr. verða settar av aftrat til dýping av Vánni, og at inntøkurnar verða settar til 310 mió.kr.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 18. november 2021:
Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá JS, SVJ, TJL og AJ, har inntøkurnar verða settar til 305 mkr., rakstrarútreiðslurnar til 245,6 mkr., § 2 verður 2,4 mkr., § 5 verður 25,2 mkr. (har 1 mkr. verður løgd aftrat til *fimleikarhøll*), § 6 verður 15,6 mkr (har størsta skerjingin er á *byggibúning* -10 mkr.), og § 7 verður 11,5 mkr. (har størsta skerjingin er á *bátahylur í Árnafirði* -6 mkr.), ið tilsamans gevur 59,4 mkr. til íløgur netto; tað fall við 4 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL og AJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, HJS, EÓP og ASB).

Atkvøtt varð síðani um tilmælið frá FíN, dagf. 16. nov. 2021; tað var samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, HJS, EÓP og ASB) og ongari ímóti; 4 atkvøddu ikki (JS, SVJ, TJL og AJ)

Sostatt er fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2021 samtykt við hesum tølum:

	Klaksvíkar kommuna	
	Fíggjarætlan 2022	**tkr.**
	Inntøkur	310.000
§1	Kommunal fyrisiting	25.200
§2	Almanna- og heilsumál	90.544
§3	Børn og ung	51.050
§4	Útbúgving og gransking	13.189
§5	Mentan og frítíð	16.400
§6	Teknisk mál	26.700
§7	Kommunalt virki	19.393
	Rakstrarútreiðslur	242.476
	Rakstraravlop	**67.524**
	Rentustuðul	3.800
	Rentur	4.200
	Avdráttir	0
	Úrslit áðrenn íløgur	59.524
	Íløgur	78.400
	Úrslit (hall)	**-18.876**

		Útgreining íløgur:	**tkr.**
§2	TrN	Skúlatannlæknin	400
§2	NBH	NBH, Bøgøta	2.000
§2	NBH	NBH, Tænastudepil á Viðareiði	3.000
			5.400
§3	B&U	Barnagarðar - ábøtur	500
§3	B&U	Barnagarðar - ljóðdoyving	200
			700
§4	B&U	Skúlagarður	3.000
§4	B&U	Nýggjur skúli	1.000
			4.000
§5	MeN	Mentanarhús (íløgustuðul)	12.000
§5	MeN	Svimjihylur Svínoy	100
§5	MeN	Stadionøkið - skýlið	3.500
§5	MeN	Róðrarneyst	7.500
§5	HeiN	Bókasavn - Isenkram	700
§5	HeiN	Havsvimjarar	400
			24.200
§6	MeN	Sparkivallir	1.200
§6	MeN	Sparkivallir, útgerð	300
§6	UBN	Fastognir	2.000
§6	UBN	Søla fastognir	-5.500
§6	UBN	Byggibúning	32.400
§6	UBN	Byggibúning - søla lendi á Fossum	-12.400
§6	UBN	Byggibúning vegir eldri hús	2.500
§6	UBN	Byggibúning - søla lendi aðrastaðnis	-3.000
§6	UBN	Kloakkir	3.000
§6	HaVN	Byggibúning ídnaðarøki	4.300
§6	HaVN	Byggibúning ídnaðarøki - søla lendi	-12.200
§6	UBN	Byggibúning miðbýur	2.000
§6	TN	Vegir	7.000
§6	TN	Vegir - Raðhúsini á Stangavegnum	3.000
§6	TN	Maskinur	2.000
			26.600
§7	TN	Sløkkiliðið	3.100
§7	HaVN	Bátahylur Árnafirði	8.000
§7	HaVN	Víðkan Norðhavnin	3.000
§7	HaVN	Havnagerð Pomek	1.400
§7	HaVN	Dýping á Vánni	1.000
§7	HaVN	Sølutorg	1.000
			17.500
		Íløgur tilsamans, netto	**78.400**
		Herav íløgustuðul Mentanarhúsið 12.000 tkr	

	Ialt
Íløgur útreiðslur brutto	111.500
Íløgur søla/inntøkur	-33.100
Íløgur netto	78.400

Harumframt varð samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75 %** og einum **barnafrádrátti** upp á **5.500 kr.** við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, HJS, EÓP og ASB) og ongari ímóti; 4 atkvøddu ikki (JS, SVJ, TJL og AJ).

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

184/21
21/01598-1 Umsókn um keyp av lendi

Fundurin lokin kl. 20:30